# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 28. september 2020
Mál nr.: 20/00421
Málsviðgjørt: JEK
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Løgtingsmál nr. xx/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)

(Skattlig javnseting av persónum við framskundaðari pensjón og fyritíðarpensjón umframt ávísar broytingar av tekniskum slag)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 144 frá 13. november 2019, verður gjørd henda broyting:

§ 3 verður orðað soleiðis:
"§ 3. Persónur, sum fær fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt.
*Stk. 2.* Frádrátturin fyri giftar persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, er 10.500 kr.
*Stk.* 3. Frádrátturin fyri stakar persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón, er 16.200 kr.
*Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Í 2020 er landsskattafrádrátturin upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið. Í 2021 og fylgjandi ár er landsskattafrádrátturin upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2020.

**§ 3**

Broytingin um, at ásetingin ikki longur er galdandi fyri persónar, sum eru 67 ár ella eldri, er galdandi fyri nýggj pensjónsmál.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í sambandi við sokallaðu pensjónsnýskipanina, sum hevur verið í gildi síðani 1. januar 2020 (løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018), er eitt nýtt pensjónsslag, *framskundað pensjón*, sett í almannapensjónslógina.

Endamálið við at seta í verk framskundaða pensjón var, at persónur, sum er niðurslitin, og sum nærkast fólkapensjónsaldri, skal fáa eitt sindur skjótari málsviðgerð enn tað, sum er vanligt í fyritíðarpensjónsmálum, men ein manglandi konsekvensbroyting í ásetingarlógini hevur við sær, at persónur við framskundaðari pensjón hevur lægri inntøku eftir skatt og gjøld enn fyritíðarpensjonistur.

Eisini er neyðugt við øðrum smávegis broytingum av tekniskum slag.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu fær hvør persónur, sum er undir fullari skattskyldu eftir reglunum í skattalógini, og sum er 67 ár ella eldri ella fær fyritíðarpensjón ella hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt. Persónur, sum fær fólkapensjón, hevur tó ikki rætt til henda frádrátt.

Frádrátturin fyri giftar persónar, sum eru 67 ár ella eldri, og giftar persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, er 10.500 kr.

Frádrátturin fyri stakar persónar, sum eru 67 ár ella eldri, og stakar persónar, sum fáa fyritíðarpensjón ella fáa hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini, er 16.200 kr.

Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært lóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Í 2020 er landsskattafrádrátturin upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið. Í 2021 og fylgjandi ár er landsskattafrádrátturin upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er skattliga at javnseta persónar, sum fáa framskundaða pensjón, við fyritíðarpensjónistar.

Í sambandi við sokallaðu pensjónsnýskipanina, sum hevur verið í gildi síðani 1. januar 2020 (løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018) er eitt nýtt pensjónsslag, *framskundað pensjón*, sett í almannapensjónslógina. Persónar 64 ár ella eldri við varandi skerdum arbeiðsføri kunnu søkja um framskundaða pensjón. Treytirnar fyri at fáa játtað framskundaða pensjón eru tær somu sum til fyritíðarpensjón. T.v.s. at í staðin fyri at søkja um fyritíðarpensjón skal persónur 64 ár ella eldri søkja um framskundaða pensjón, og sostatt er her ikki talan um ein nýggjan persónsskara.

Endamálið við at seta í verk framskundaða pensjón var, at persónur, sum er niðurslitin, og sum nærkast fólkapensjónsaldri, skal fáa eitt sindur skjótari málsviðgerð enn tað, sum er vanligt í fyritíðarpensjónsmálum. T.v.s., at politiska endamálið við framskundaðari pensjón var, at veiting og treytir annars skulu vera tær somu sum við fyritíðarpensjón (sí annars løgtingsmál nr. 67/2017).

Giftur fyritíðarpensjonistur hevur sbrt. ásetingarlógini rætt til ein frádrátt í landsskattinum á 10.500 kr. um árið, meðan stakur fyritíðarpensjonistur hevur rætt til frádrátt á 16.200 kr. um árið. Ásetingarlógin bleiv ikki broytt í sambandi við pensjónsnýskipanina, og tað merkir, at persónar við framskundaðari pensjón ikki hava somu skattaviðurskifti sum fyritíðarpensjonistar, hetta hóast umstøðurnar annars eru tær somu.

Í § 3 í ásetingarlógini verður í fleiri førum víst til forsorgarlógina. Forsorgarlógin fer úr gildi við árslok 2020, og verður tilvísingin tí ikki longur viðkomandi. Tað er ongin persónur, sum í løtuni fær hjálp sambært hesi ásetingini í forsorgarlógini.

Persónur, sum er 67 ár ella eldri, sum ikki móttekur fólkapensjón, hevur eisini rætt til sama frádráttin sum fyritíðarpensjonistar. Ásetingin hevur nærum ikki verið brúkt, tí tað hevur bert verið onkur einstakur persónur, sum hevur valt ikki at móttaka fólkapensjón. Grundupphæddin hevur altíð verið veitt uttan mun til inntøkuviðurskifti. Tá persónur hevur valt ikki at móttaka fólkapensjón, hevur viðkomandi so fingið ein skattafrádrátt í staðin.

Við broytingunum í almannapensjónslógini, sum komu í gildi 1. januar 2020, er gjørligt, hjá nýggjum pensjónistum at útseta pensjónina. Afturfyri fær viðkomandi hægri pensjón, tá hann ikki longur hevur útsetta pensjón. Persónur, sum útsetir pensjónina, fær sambært TAKS ikki skattafrádráttin sambært § 3 í ásetingarlógini. Nýggir pensjonistar, sum velja ikki at móttaka fólkapensjón, fáa ikki skattafrádráttin, men fáa harafturímóti hægri pensjón seinni. Frameftir fer ásetingin um frádrátt til fólkapensjonistar sostatt ikki at hava nakran týdning.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður ásetingarlógin dagførd.

- Skattliga verða persónar, sum fáa framskundaða pensjón, javnsettir við fyritíðarpensjónistar.
- Ásetingin verður avmarkað til persónar, sum eru undir 67 ár
- Tilvísingin til forsorgarlógina, sum fer úr gildi 1. januar 2021, verður strikað.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Almannmálaráðnum, Almannaverkinum og TAKS.

Harumframt hevur uppskotið verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur hevur ikki ótilætlar fíggjarligar avleiðingar. Tað hevur frá byrjan av ligið í kortunum, at persónar við framskundaðari pensjón skulu hava somu treytir sum

fyritíðarpensjonistar. Í sambandi við pensjónsnýskipanina var játtanin heldur ikki tillagað eftir, at framskundað pensjón ikki skulu hava rætt til skattafrádráttin.

Fyri kommurnar er støðan óbroytt í mun til galdandi lóggávu. Við øðrum orðum hevur uppskotið ikki við sær nýggjar fíggjarligar avleiðingar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri persónar, sum nærkast pensjónsaldri og sum eru niðurslitnir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ikki kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið er heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið javnsetir persónar, sum fáa framskundaða pensjón við persónar, sum fáa fyritíðarpensjón.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við uppskotinum verður § 3, stk. 1 orðað soleiðis, at hon fevnir um persónar, sum móttaka fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón.

Við ársskiftið fer forsorgarlógin úr gildi, og er tilvísingin til § 13 í forsorgarlógini tí strikað.

Tað er eingin persónur, sum í løtuni fær hjálp eftir § 13 í forsorgarlógini.

Persónur 67 ár ella eldri, sum ikki fær fólkapensjón kann útseta pensjónina og afturfyri fáa hægri pensjón seinni. Tað hevur ikki verið ætlanin at viðkomandi eisini skal fáa skattafrádrátt sbrt. § 3 í ásetingarlógini, og orðingin um persónar sum eru 67 ár ella eldri er tí strikað.

Stk. 4 í uppskotinum er óbroytt í mun til galdandi áseting.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu

**Til § 3**
Ein persónur í fólkapensjónsaldri fær pensjón sbrt. gomlu ásetingunum, og er tí ein skiftisregla sett inn í uppskotið um, at broytingin er avmarkað til nýggj pensjónsmál.

Fíggjarmálaráðið, 28. september 2020

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: